gult26 cyan26 magenta26 svart26



Skála – B36 2-2 (1-0)

# Oddaliðini spældu javnt

**Tað var heimaliðið, ið stýrdi øllum í fyrra hálvleiki, meðan B36 kom sterkt aftur eftir steðgin. Liðini liggja framvegis í oddinum í næstubesta deildini**

2. DEILD
*Jákup Mørk*

Oddadystur var á Skála leygardagin, har uppflytararnir Skála tók ímóti B36. Hesi bæði liðini hava enn ikki tapt í landskappingini, og tí var lagt upp til spennandi dyst.

Tað var Skála, ið hevði takið á dystinum fyri steðgin. Skálamenn tóktust betri upplagdir, meðan B36 liðið var drálandi og tordi ikki at fara niðan á vøllin. Tað mesta av spælinum fór tí fram á B36 hálvuni.

Útiliðið pakkaði seg tó somikið væl saman í verjuni, at tað ikki eydnaðist heimaliðnum at spæla seg fram til nógvar málmøguleikar.

Skála kom fyrst á máltalvuna, tá Pauli Hansen skoraði. Hann setti álop í gongd á miðjuni og spældi út í síðuna, haðani lagt varð inn í brotsteigin. Pauli tók niður við bringuni og sendi framvið málverjanum til hálvleiksstøðuna 1-0.

### B36 legði hart út

Í hálvleikinum hevur venjarin hjá B36 sagt nøkur álvarsorð við leikararnar. B36 skifti út og legði nýggja leikætlan, og tað eydnaðist væl.

Ikki vóru spældir nógvir minuttir, tá Heini í Skorini javnaði fyri B36. Ein flatur bóltur var sendur inn móti brotsteiginum, har Heini vendi sær hegnisliga og langaði til uttanfyri brotsteigarmarkið, og so var 1-1.

B36 helt fram við at trýsta Skálamenn og hevði fleiri møguleikar, meðan Skála ikki megnaði at finna spælið frá fyrra hálvleiki framaftur.

Eina løtu eftir legði B36 seg framum. B36 fór í mótálop, og Heini í Skorini varð spældur oman móti baklinjuni. Hann legði innfyri til Áka Mørk, ið ótarnaður kundi seta fótin á til 2-1. Sum heild var B36 vandamiklari í seinna hálvleiki, men megnaði ikki at avgera dystin.

Heimaliðið tóktist skelkað av gongdini, men eftir málið kom Skála aftur meira við aftur í dystin. Skála setti nú fleiri álop í gongd, men einki gjørdist veruliga vandamikið.

Tað eydnaðist tó at fáa útjavnandi málið, so Skála eisini forðaði fyri, at B36 fór trý stig framum. Skála hevði hornaspark, sum B36 verjan í fyrsta umfari beindi burtur, men bólturin varð sendur innaftur í brotsteigin, har ein Esbern Jacobsen stóð púra leysur og beindi í netið.

2-2 var endaliga úrslitið í oddadystinum. Næsta vikuskifti spælir Skála á útivølli móti LÍF, meðan B36 tekur ímóti botnliðnum GÍ.

### Skála–B36 2-2 (1-0)

1-0: Pauli Hansen
1-1: Heini í Skorini
2-1: Áki Mørk
2-2: Esbern Jacobsen

# BRIDGE



### Rottneros

Føroyska liðið, sum spældi í Rottneros kappingini seinasta vikuskifti, byrjaði kappingina avbera væl við at vinna móti Danmark 16-13 (føroyingar vóru dømdir at missa eitt stig fyri manglandi alert-melding). Eftir hesa góðu byrjan megnaðu teir kortini ikki at halda stílinum og taptu allar hinar dystirnar, so samlaða úrslitið var, at vit enn eina ferð endaði á aftasta plássinum í hesari kappingini. Rottneros kappingin er annað hvørt ár, og eru tað vinnarnir av steypakappinginum í Norðurlondunum, sum spæla við har.

Tey føroysku úrslitini í Rottneros vóru hesi:

| | |
|---|---|
| Føroyar - Danmark | 16-13 |
| Føroyar - Noreg | 7-23 |
| Føroyar - Finland | 10-20 |
| Føroyar - Svøríki | 2-25 |
| Føroyar - Ísland | 7-23 |

Endaliga støðan í Rottneros:

| | |
|---|---|
| 1. Ísland | 95 stig |
| 2. Noreg | 86 - |
| 3. Svøríki | 82 - |
| 4. Danmark | 77 - |
| 5. Finland | 64 - |
| 6. Føroyar | 42 - |

### Kagga Cup í Bridge 2001

Síðsta vikuskifti var tann árliga Kagga Cup í bridge leikt í Kagganum. 18 pør løgdu til brots kl 14:00 og spældu vóru 32 spøl, 8 umfør á 4 spøl. Kappingin var sera væl fyriskipað og leikararnir høvdu ein góðan dag í teimum góðu hølunum hjá Kagganum. Kappingin var jøvn, men tað ið avtornaði vunnu teir báðir Zakaris Joensen and Salomon Johansen, og Bogi Simonsen og Niels Nielsen vóru nummar tvey.

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Salomon Johansen - Zakaris Joensen | 337 |
| 2. | Bogi Simonsen - Niels Nielsen | 300 |
| 3. | Helgi Joensen - Eyðun Joensen | 282 |
| 4. | Robert Langgaard - Eyðun Anthoniussen | 279 |
| 5. | Carl Mikkelsen - Jógvan Ranghamar | 275 |
| 6. | Rói á Røgvu Joensen - Heðin Mouritsen | 271 |
| 7. | Hallberg Arnfríðsson - Kaj Alstrup | 267 |
| 8. | Pól Joensen - Jórun Johannesen | 260 |
| 9. | Hans J. Petersen - Johannes Skaarup | 250 |
| 10. | Finn Ougaard - Høgni Jacobsen | 249 |
| 11. | Gunnar Mouritsen - Høgni Vesturklett | 245 |
| 12. | Øssur Winthereig - Høgni Hansen | 243 |
| 13. | Magni Jøkladal - Pól Egholm | 241 |
| 14. | Marjun Restorff - Arnleyg Mikkelsen | 240 |
| 15. | Bjarki Johannesen - Luitjen Apol | 239 |
| 16. | Jón Andreasen - Eilif Andreasen | 221 |
| 17. | Steinbjørn Zachariasen - Albert Hansen | 204 |
| 18. | Jóna Grunnveit - Súsanna Danielsen | 193 |

### Eitt spæl

At Zakaris og Salamon eru "parhávar", vita allir bridgespælarar, ið hava spælt móti teimum. Hetta spælið er eitt gott dømi um tað. Spælið er frá næstseinasta umfari móti Boga og Niels. Bogi sæt í fjórðu hond við:

| | |
|---|---|
| Sp | E9873 |
| Hj | 108 |
| Rú | 7 |
| Kl | DB108 |

Meldingarnar vóru:

| N | E | S | V |
|---|---|---|---|
| Salamon | Bogi | Zakaris | Niels |
| - | - | 1 rú | pass |
| 1 sp | pass!! | 3 rú?! | pass |
| 3 ut | D?? | pass | pass |
| pass | | | |

Bogi sá ein møguleika at fáa eitt gott spæl og gamblaði við einari dobling. Hann spældi kleyvara frúgv út, lítla løtu seinni kundi Salamon notera sær 750 og ein topp.

Kortini hjá N/S

| | Norðan | Sunnan |
|---|---|---|
| Sp | KDB5 | 2 |
| Hj | B756 | ED32 |
| Rú | K10 | ED98632 |
| Kl | K9 | 7 |

Standard meldið er 4 hj við 10 stingum, so hevði Bogi bara meldað pass, hevði hann fingið ein topp. 3 ut óduplað eigur at fara niður, tí tá skal spælførarin klípa eftir hj kongi fyri at klára tey, ið er í 4hj, og hann situr ikki.

### Klaksvíkingar fáa vitjan

Klaksvíkingar hava í nógv ár havt gott samband við bridgespælarar úr grannalondunum okkara Hetlandi og Íslandi. 28. mai fáa teir vitjan av bæði hetlendingum og íslendingum. Úr Hetlandi koma 8 leikarar og úr Íslandi 15 leikarar. Klaksvíkingar skipa fyri liðkapping týskvøldið 29. mai. Mikudagin verður útferð gjørd saman við gestunum, og um kvøldið verður spæld parakapping. Hósdagin skipa teir fyri veitslu og einari serligari hugnaligari kapping, sum teir kalla "Gestir og vertir", t.v.s. at gestirnir fáa hvør sín klaksvíking til makkara. Íslendingarnir fara heim aftur fríggjadagin 1. juni, men hetlendingarnir ætla sær til Havnar at spæla við í WBF Simultan kappingini fríggjakvøldið.

### WBF Simultan

Vit fara her enn einaferð at minna fólk á, at tann stóra árliga simultan kappingin hjá WBF (World Bridge Federation) verður spæld í Bridgehúsinum fríggjakvøldið 1. juni kl. 19.00. Hetta er ein opin parakapping, har øll eru vælkomin at spæla við. Spæligjaldið fer til at stuðla unglingalandsliðnum, sum skal til NM í summar.

## Unglingaleikarin hesu ferð:



Navn: Høgni Vesturklett
Føddur: 21. September 1983
Bústaður: Tórshavn

Høgni byrjaði at spæla bridge fyri 4 árum síðani. Hann hevur seinastu árini verið makkari við Gunnari Mouritsen, og í summar skulu teir báðir umboða føroysku litirnar í NM kappingini í Trelleborg. Í vetur spældu teir báðir saman í 1. deild. Høgni arbeiðir í løtuni á lagrinum hjá Poul Hansen.

gult27 cyan27 magenta27 svart27



ÍF-KÍ 1-2 (0-2)

# Tann umvenda verð

**KÍ hevur óvæntað lagt seg í oddin, meðan ÍF eins óvæntað er at finna í niðaru hálvu**

2. DEILD
*Jákup Mørk*

Somikið óvæntað er støðan í aðru deild, nú fýra umfør eru farin aftur um bak.

KÍ hevur í mong ár livað eina trupla tilveru í aðru deild, har tað ofta hevur staðið á at manna lið. Í ár mundi støðan ikki síggja betri út, tá tað varð greitt, at fremsta liðnum tørvaði fólk, men higartil hava næstbestu klaksvíkingarnir tikið øll á bóli.

Tað sama kann sigast um ÍF, men her hava teir yvirraskað skeivan vegin. Fáur mundi undan kappingarinum ivast í, at ÍF fór at verða við í oddinum, men higar til hevur hetta so verið av ongum.

### ÍF hevði spælið

Tá hetta er sagt, skal eisini leggjast afturat, at um tað í fótbólti var avgerandi, hvat lið hevði bóltin meira, so vann ÍF stórsigur á KÍ. Klaksvíkingar komu til Fuglafjarðar við kontrafótbólti í kvittanunum, og hetta gav eisini bonus.

Í báðum førum var tað Olgar Danielsen, sum stóð fyri málinum, og bæði tvey vóru dømi um, at at veteranurin ikki skal hava serliga leysar teymar, fyri at gera seg galdandi.

Fyrst viðførdi verjumistak, at Olgar gjørdist leysur við málverjanum, og í seinna førinum stóð hann púra leysur við hornaspark, og so hevði KÍ vunnið sær eina óvæntaða tvey mála leiðslu.

### ÍF trýstið

Annars vóru tað fuglfirðingar, sum trýstu, men løn fingu teir ikki. Ikki annað enn troystarmálið, sum Heini Heinason skallaði miðskeiðis í seinna umfarinum.

Fuglfirðingar høvdu eisini hópin av øðrum møguleikum, men líka mikið hvussu teir royndu, so fekst bólturin ikki í málið.

Við sigrinum komu klaksvíkingar heilt í oddin, har teir eru ájavnir við Skála og B36, meðan í løtuni er at finna á sjeynda plássinum. Munurin millum liðini er tó lítil, og tí kann alt enn henda, men skal talan gerast um beinleiðis uppflytan, skulu ÍF helst skjótt fara at gera um seg.

### ÍF-KÍ 1-2 (0-2)

0-1: Olgar Danielsen
0-2: Olgar Danielsen
1-2: horna Heini Heinason

# Toppurin í hitan aftur

**Tríggjar sterkar kappingar verða í hesum døgum telvaðar, tann eina í Meksiko har millum annað Anand luttekur og ein í Bosnia har Topalov saman við Sokolov stríðast. Mest áhugaverda kappingin er tó í Kasakstan við eitt nú Kasparov og Kramnik millum luttakararnar.**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Ikki er tað gerandiskostur í talvheiminum at tríggjar sterkar stórmeistarakappingar verða telvaðar samstundis.

Tað eru tó fleiri aðrar minni sterkar kappingar kring heimum í hesum døgum, eitt nú ein stór opin kapping í Liktenstein, har Martin Poulsen saman við øðrum næmingum úr Tjele Efterskole luttekur. Martin hevur hálvtannað stig av trimum møguligum, og í øðrum umfari fekk hann javnleik ímóti hollendskum altjóða meistara. Eitt sera flott úrslit. Hann vann móti væl lægri telvara í fyrsta talvinum, meðan hann tapti í triðja umfari ímóti sterkari telvara. Fylgjast kann við Martin á www.supra.net/schach.

Tann veikara av teimum trimum stórmeistarakappingunum er í Bosnia. Eftir sjey umførum liggja Topalov, Georgiev og Smirin á odda við fimm stigum, meðan Sokolov hevur hálvtfjórða stig og liggur á einum sætta plássi. Níggju umfør skulu telvast.

Í Merida, Meksiko, manna Anand, Khalifman, Short og lokali Hernandez fýramans hópin. Tvær reisir skulu teir hittast, seks umfør. Anand liggur trygt á odda við hálvumtriðja stigi av trimum møguligum. Khalifman og Short hava hálvtannað, meðan Hernandez sum eisini hevur nógv tí lægstu ratingina, hevur hálvt stig. Anand hevur leikt sera væl higartil.

### Russar omaná

Fimm superstórmeistarar og ein lokalur, men eisini sterkasti telvari úr Kasakstan stríðast hesar døgum í jubilæumskapping í Astana, Kasakstan. Tað er nevnliga tíggju ár síðani Kasakstan bleiv egin tjóð.

Luttakarnir eru Kasparov, Kramnik, Morozevich, Shirov, Gelfand og Sadvakhasov, sum er lokala hetjan, men sanniliga eisini nógv tann veikasti tá rating viðvíkur. Eins og í Merida verður leikt tvær reisir ímóti hvørjum øðrum, tað vil siga tíggju umfør.

Fyrsta umfar bleiv leikt sunnudagin, og vunnu teir tríggir russarnir síni talv. Morozevich niðurspældi Sadvakhasov, Kramnik vann eitt drúgvt men klassiskt talv ímóti Gelfand, meðan Kasparov vann sera flott við svarta fólkinum á Shirov, sum hevur eitt Kasparov kompleks. Kasparov er nevnliga í sigrum á odda 12-0 ímóti honum.

Kasparov hevur tí fingið bestu byrjan við sínum sigri við svarta fólkinum. Talvið er við í blaðnum í dag. Fylgjast kann við kappingunum í Meksiko og Kasakstan beinleiðis á www.kasparovchess.com.

### Vil síggja føroysku talvini

Eftir lokna kapping, hon endar 1. juni, vendir Kasparov skjótt eyguni til okkara Føroyar. Hendan stórsliga vitjan verður í døgunum 8-12. juni. Meir um skránna hjá Kasparov í komandi viku.

Men sigast kann at sunnudagin 9. juni fer hann at telva simultandyst ímóti landsliðnum, og verður hann tá væl fyrireikaður til hendan dyst. Hann hevur nevnliga persónliga heitt á TSF at fáa øll talvini hjá føroysku landsliðstelvarunum til hóldar, soleiðis at hann kennir føroysku mótstøðuna væl og virðiliga.

Hann tekur ivaleyst hendan dyst í ramasta álvara, sjálvt um hann er stórfavorittur at vinna 6-0. Neyvan høvdu teir á landsliði okkara vænta at sjálvur Kasparov nakrantíð fór at fyrireika seg ímóti júst teimum, men hetta er sostatt veruleikin.




## Talvið hesa vikuna

**Shirov,A - Kasparov,G**
**Astana 2001 (1), 20.05.2001**

Sisilianskt
1.e4 c5 2.Nf3 d6 3.d4 cxd4 4.Nxd4 Nf6 5.Nc3 a6 6.Be3 e6 7.Be2 Qc7 8.0-0 b5 9.a4 (neyðugt um hvítur skal fáa nakað burturúr byrjanini) 9...b4 10.Na2 Nxe4 11.c3 b3! (bxc3 hevði givið hvítum c-linjuna og sera gott spæl. neyðugt er at offra finnuna aftur) 12.Qxb3 Be7 13.Bf3 Bb7 14.Qc2 Nf6 15.Bxb7 Qxb7 16.b4 0-0 17.b5 (Shirov tykist at hava góða og sunna støðu, men Kasparov avviklar til egnan fyrimun við næsta leikinum) 17...Ng4! 18.Bf4 ivasamt. [18.Bd2 Rc8 19.Nb4 Bf6 og svarti riddarin endar á c4, við fyrimuni. Bd2 hevði tó verið betri enn Bf4.] 18...e5 19.Qe2 exd4 20.Qxg4 axb5 21.axb5 Qxb5 22.cxd4 Qc4 (Kasparov vinnur finnu) 23.Rae1 Nc6 24.Nc1? [24.Rc1 Qxd4 25.Rxc6 Rxa2 26.Qg3 og Shirov kann enn møguliga berjast fyri javnleikinum.] 24...Qxd4 25.Ne2 Qa4 26.Qg3 Rfd8! (verjir finnuna og gevur pláss á f8 til bispin) 27.Nc3 Qb3 28.Re3 d5 29.Bh6 Bf8 30.Ne4 Qb2 31.Nc5 (Shirov roynir seg við offrið, men Kasparov svarar pent aftur) 31...Bxc5 32.Rc3 (hóttir mát á g7)



32...Bxf2+! 33.Rxf2 Ra1+ 34.Rf1 Qb6+ 35.Re3 Rxf1+ 36.Kxf1 Qd4 37.Qc7 Qc4+ (og gxh6 er næsti leikur) 0-1